LM-011/2023

Fylgiskjal 2

Kristjan Árnason

Fra: Anna Havmand <anna@torshavn.fo>
Sendt: 11. august 2023 11:22
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Hoyringarsvar til lógaruppskot um stuðul til at byggja stórhøll í Hoyvík

Til Almanna- og mentamálaráðið,

Tórshavnar kommuna hevur fingið til ummælis uppskot til løgtingslóg um stuðul til at byggja stórhøll í Hoyvík.

Tórshavnar kommuna skal í hesum sambandi viðmerkja, at tað er at fegnast um, at heimild verður latin landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum at stuðla byggingini. Komandi stórhøllin í Hoyvík kostar omanfyri 200 mió. kr., og Tórshavnar kommuna hevur bundið seg at játta 50% av samlaða byggikostnaðinum í stuðuli - tó í mesta lagi 132 mió. kr. Á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2023 eru 50 mió. kr. settar av til byggingina, og á fíggjarætlanunum fyri 2024 og 2025 verður írestandi upphæddin játtað til verkætlanina.

Sáttmáli er gjørdur við Articon um at byggja Stórhøllina, og er arbeiðið farið í gongd. Samlaða byggitíðin er mett til umleið 20 mánaðir, og væntandi stendur stórhøllin liðug í 2025.

Áðrenn farið varð í gongd við verkætlanina hava stigtakararnir tryggjað sær, at játtan er fingið til vega til allan byggikostnaðin. Tórshavnar kommuna er nógv tann størsti einstaki stuðulsveitarin, og umframt kommununa hava Løgtingið, Fólkatingið og privatir grunnar játtað at stuðla verkætlanini.

At heimild nú verður latin landsstýriskvinnuni at rinda út tann stuðul, ið restar í av teirri upphæddini, ið landið vil stuðla byggingini við, er tískil í tráð við ta tilsøgn, ið stigtakararnir hava fingið.

Tórshavnar kommuna skal tí viðmæla uppskotið og heita á Løgtingið um at samtykkja uppskotið, sum tað fyriliggur.

Vegna Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóra

Anna Havmand, skrivari

Tórshavnar kommuna
Stjórnarskrivstovan

Vaglið, postboks 32, 110 Tórshavn
Telefon 302010 / Beinleiðis 302273
anna@torshavn.fo
www.torshavn.fo